# Fyrsta visjónstorg viðvíkjandi Visjón 2015

**Í dag byrjaði fyrsta visjónstorgið á Hotel Føroyum. Strategibólkarnir løgdu sína ætlan fram, og síðan var orðaskifti á skránni. Umframt umboð fyri strategibólkarnar, vóru eisini politikarar, fakfeløg, áhugafeløg og embætismenn við á fundinum.**

Jóannes Ejdesgaard, løgmaður:

## – Noyðast at rógva í felag

**Visjónstorgið byrjaði við, at Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, beyð vælkomin.**
**– Í dag skulu vit fyri fyrstu ferð realisera Visjón 2015, so alt samfelagið ítøkiliga kann vísa á hana, legði Jóannes Ejdesgaard út við at siga í røðu síni.**

VISJÓN 2015
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Tá løgmaður í dag beyð øllum vælkomin til fyrsta visjónstorgið, legði hann dent á, at tað ringasta vit kunnu gera, er einki at gera:

– Vit noyðast at eggja hvønn annan, so vit í felag mennast. Um vit einki gera, verður ónøgd og ruðuleiki. Tí er okkara skylda at leggja ætlanir fyri framtíðina.

– Visjón 2015 er nú komin fram á borðið, tí vit hava sæð, at vit noyðast at leggja eina nýggja kós fyri tey næstu 10 árini, segði løgmaður og legði afturat, at hóast 9 ár eru til 2015, ber ikki til at leggja árar inn og bíða:

– Vit hava nógv tøk fyri framman og noyðast at fara í gongd alt fyri eitt. Onkur spyr kanska: "Hví Visjón 2015 og ikki Visjón 2006?". Vit hava nógvar trupulleikar í Føroyum í dag – eitt nú á skúlaøkinum. Teir trupulleikarnar skulu vit sjálvandi loysa beinanvegin, men samstundis noyðast vit at hugsa langt, tí so vinna vit enn meira.

– Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, føroyska samfelagið hevur sett seg niður í felag. Øll eru samd um, at Føroyar skal verða millum tey bestu londini í 2015.

At enda segði løgmaður, at á visjónstorginum í dag vóru øll vælkomin at koma við rósi, rísi og áheitanum til strategibólkarnar, so øll í felag kunnu rógva saman og gera Visjón 2015 til »fólksins ætlan«.




*– Í dag skulu vit fyri fyrstu ferð realisera Visjón 2015, so alt samfelagið ítøkiliga kann vísa á hana, legði Jóannes Ejdesgaard út við at siga í røðu síni.*

## Alnetið skal lyfta føroyska samfelagið

**Strategibólkurin fyri kunningar- og samskiftistøkni legði fyrst sína ætlan fram á visjónstorginum á Hotel Føroyum í dag. – Alnetið skal verða ein berandi partur av øllum og lyfta føroyska samfelagið frá einum ídnaðarsamfelagi og til eitt »innovasjónssamfelag«, segði Anna Mittún Jacobsen, ið legði ætlanina hjá KT-bólkinum fram.**



*Strategibólkurin fyri kunningar- og samskiftistøkni legði fyrst sína ætlan fram á visjónstorginum á Hotel Føroyum í dag.*

VISJÓN 2015
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Visjónin er, at nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni í tí almenna, í skúlaverkinum og í vinnuni skal vera við til at lyfta føroyska samfelagið frá einum ídnaðarsamfelagi og til eitt »innovasjónssamfelag«. Hetta fer at føra við sær, at føroyska vinnan kann gera seg galdandi á altjóða pallinum, segði Anna Mittún Jacobsen og legði eina við, at høvuðstrupulleikin í KT er, at Føroyar vanta føroyingar við altjóða royndum:

– Men í 2015 skal alnetið verða ein natúrligur og berandi partur av gerandislívinum. KT skal verða við til at lyfta støðið í allari undirvísing, tað almenna skal verða ein áhaldandi drívmegi í at nýta kunningartøkni á ein fyrimyndarligan hátt og somuleiðis skal alnetið verða ein natúrligur og berandi partur av øllum vinnulívinum, segði Anna Mittún Jacobsen millum annað, tá hon legði ætlanina hjá KT-bólkinum fram á Hotel Føroyum í morgun.

***Vit hava meira um visjónstorgið á Hotel Føroyum í Sosialinum í morgin.***

## Hetlendingar vilja ikki av við Norrönu

– Í Skotlandi síggja vit nógvar inntøkumøguleikar, og hetta kann vera við til at tryggja, at tann positiva fíggjarliga kósin vit hava sett kann verða hildin, sigur stjórin, Tummas Magnussen um avgerðina.

Verður avgerðin sett í verk, merkir hetta at Norröna fer at sigla uppá onkra skotska havn longu komandi summar. Hervið steðgar siglingin uppá Hetland.

Um hetta sigur Tummas Magnussen:

– Tað er við sorgblídni at vit gera hetta, men tað er ein sannroynd at vit hava mist pening við hesi siglingini. Vit kunnu tí ikki forsvara at halda fram við eini rutu, sum gevur hall.

At Hetlandssiglingin ikki hongur saman fíggjarliga kunnu teir á Smyril Line staðfesta. Men tíðindini um hetta skapa ikki fagnaðarróp í Hetlandi. Her hevur hetlendski partaeigarin í Smyril Line, Shetland Developement Trust boðað frá tiltøkum at steðga hesi ætlanini.

– Vit eru sera misnøgd við avgerðina, og harmast um at hetta skal vera neyðugt, sigur stjórin í hesum grunninum, Josie Simpson.

Hann minnir á, at grunnurin setti 4,2 mió. pund í nýggju Norrönu, samstundis sum ein tryggjaði sær at hon skuldi sigla upp á Hetland í fleiri ár aftrat.

– Okkara arbeiði verður nú at verja áhugamálini hjá Hetlandi í Smyril Line, og ta positivu ávirkan sum siglingin hóast alt hevur havt fyri okkum, sigur hann.

Spurningurin er so, hvørt hesi orðini gera nakran mun mótvegis leiðsluni í Smyril Line. Her verður hinvegin víst á, at tann dýrkaða oljan, eitt stórt orkukrevjandi skip og hækkandi havnargjøld hava víst, at siglingin altso ikki hongur saman fíggjarliga.

**sb**